LM-001/2020

Annika Petersen

Fra: megd <megd@megd.fo>
Sendt: 19. juni 2020 09:18
Til: VMR-Journal; VMR-Journal
Cc: Annika Petersen
Emne: SV: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunuval og løgtingsval til hoyringar
Vedhæftede filer: Hoyringsskriv MEGD.pdf

Góðan dag!

Takk fyri lógaruppskotið, sum er sent MEGD til hoyringar.

Svarið frá MEGD er krøkt uppí t-brævið.

Vinaliga vátta móttøku av hesum brævi.

Blíðar heilsanir

Jónvør Christiansen
Aðalskrivari/General Secretary
Tlf. +298 214026
jonvor@megd.fo
www.megd.fo

Fra: Annika Petersen <AnnikaHenrikkaHannaP@uvmr.fo>
Sendt: fríggjadagur, 12. juni 2020 11:51
Til: megd <megd@megd.fo>; Familjufyrisitingin <famf@famf.fo>; Malan Johansen <malan@landsbankin.fo>; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; All in Representation to Copenhagen <copenhagen@uvmr.fo>; The Mission of the Faroes to the European Union <brussels@tinganes.fo>; All in Representation to Reykjavik <reykjavik@ummr.fo>; Sendistovan í Moskva <moskva@uvmr.fo>; All in Representation to London <london@uvmr.fo>
Cc: Jónas Tór Næs <JonasN@uvmr.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@uvmr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunuval og løgtingsval til hoyringar

Góðan dag.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunuval og løgtingsval verður hervið sent tykkum til hoyringar.

Lógaruppskotið snýr seg um at geva persónum, sum eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, valrætt og valbæri til kommunuval. Eisini inniheldur lógaruppskotið smávegis broytingar í mannagongdunum, tá ið veljari skal fáa hjálp við at greiða atkvøðu.

Hoyringarfreistin er sett til **fríggjadagin 10. juli 2020.**

Vinaliga sendið viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Blíða heilsanir
Annika Petersen
Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7, Postrúm 377
100 Tórshavn

Tórshavn 19.06.2020
J. nr.
Viðgjørt J.C.
Tykkara j. nr. 20/00301-7

Hoyringsskriv viðvíkjandi lógaruppskoti til:

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur og í løgtingslóg um val til Løgtingið (Valrætt til persónar, sum hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6)

MEGD hevur hesar viðmerkingar:

Vísandi til, at tað er ein mannarættur at kunna velja til løgtings- og kommunuval, fegnast MEGD um, at áheitanin frá MEGD verður gingin á møti, so fólk, sum eru undir § 6 verju, nú kunna fáa rætt at velja væntandi longu til kommunuvalið í heyst.

MEGD heitir á Føroya Løgting um at gera somu broyting í stýrisskipanarlógini, so persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, eisini fær valrætt til løgtingsval.

MEGD fegnast eisini um, at orðingar eru broyttar, so sleppast kann undan galdandi orðing í § 15 „ ...ella á annan hátt so mikið brekaður...". Brekað/ur er ikki longur tíðarhóskandi orðing.

MEGD tekur somuleiðis undir við, at veljarin kann hava persón, sum hann sjálvur velur, at hjálpa sær at greiða atkvøðu sambært grein 26, *Stk. 3. Veljarin kann krevja at annar av persónunum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, sbrt. stk. 1 ella 2, verður skiftur út við ein persón, sum veljarin sjálvur vísir á.*

Hetta er í tráð við ST- sáttmálan, grein 29, stk. 1. (iii), sum áleggur limalondunum at tryggja, at fólk, ið bera brek, sum veljarar, frítt kunnu gera vart við sín vilja, og tá ið tað er neyðugt, um tey biðja um tað, **loyva einum persóni, sum tey sjálv hava valt, at hjálpa teimum at velja.**

MEGD vil mæla til at víðka reglurnar soleiðis, at sjónveik heilt kunnu gera av, hvønn tey vilja hava við sær inn í valklivan. Hvørt tey vilja hava hjúnafelaga, fylgjara ella ein triðja persóni inn við. Tó skal tað vera møguligt at fáa hjálp frá valnevndarlimum ella hjálparfólki:
https://centerkommunikationogvelfaerdsteknologi.regionsyddanmark.dk/wm498561

MEGD vil heita á myndugleikarnar at gera neyðugar fyriskipanir í samband við val, sum tryggja, at fólk kunnu velja sjálvstøðugt uttan at noyðast at biðja um hjálp frá

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

øðrum. Vísandi til ST- sáttmálan grein 9, stk. 2 (a -h) og grein 29, sum áleggur limalondunum at beina fyri forðingum og hindri fyri atkomu og tryggja, at valstøð og vallistar eru meira atkomuligar hjá øllum. Og soleiðis tryggja, at valmannagongdir, hentleikar og tilfar eru hóskandi, atkomulig og løtt at skilja og nýta (grein 29, stk. 1, (i))

MEGD vil mæla til, at myndugleikin:

- tryggjar atkomu í rullustóli
- innrættar ein rúmligan kliva til rullustólar. Útstýrir sama høli við skermum til sjónveik: https://www.tv2lorry.dk/kv17/henrik-er-naesten-blind-ny-metode-hjaelper-i-stemmeboksen
- ger vallistar við mynd av valevnunum fyri tey, sum hava trupult at lesa skrivaðan tekst.
- ger vallistar í blindskrift Braille: https://www.blindeforbundet.no/kampanjer/valg

MEGD vil vísa til bóklingin við góðum ráðum um atkomu til val, sum Center for ligebehandling af handicappede hevur givið út:
Tilgængelighed til valg for personer med funktionsnedsættelse. Hvordan kommunerne sikrer tilgængelighed til valg og folkeafstemninger.
Kelda: https://valg.sim.dk/media/15679/tilgaengelighed-til-valg.pdf

Vinaliga fyri MEGD

Tóra við Keldu, forkvinna Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo